SUNDA KOMMUNA

# KUNNGERÐ

**um broyting í byggisamtyktini fyri Sunda kommunu (Haldórsvík)**

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Sunda kommuna á bygdaráðsfundi tann 26.05.2008 hevur samtykt at gera niðanfyristandandi broytingar í byggisamtyktini fyri Haldórsvík.

**Víðkan av bústaðarøki**
A-øki *miðstaðaøki* broytt til B-øki *bústaðarøki*. Broytingin umfatar part av matr. 79, matr.nr. 39, part av matr. nr. 77, part av matr. nr. 31, part av matr. nr. 35, matr. nr. 184b, part av matr. nr. 72, matr. nr. 38, part av matr. nr. 155, matr. nr. 163, part av matr. Nr. 50.

Broytingarnar liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð frá 16. juni til 7. juli 2007 báðir dagar írokn-aðir

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Sunda kommuna í hendi í seinasta lagi 16. september 2008.

*Oyrarbakki tann 12.06.2008*

**Sunda kommuna**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Nóatún · Boks 3051 · FO-110 Tórshavn

## Havrannsóknarskip

Í samband við projektering av nýggjum havrann-sóknarskipi verða áhugaðar skipsteknistovur við hesum biðnar

um at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna fyri at fáa neyðuga tilfarið.

Hetta skal verða innan tann 20. juni 2008 kl. 15:00. Vart verður gjørt við at útlendskar skipsteknistovur, ið hava vent sær til Fiskirannsóknarstovuna um sama mál, fáa sama møguleika.

## Ped. stuðlar í
# Fuglafjarðar skúla

Søkt verður eftir 3 stuðlum at arbeiða alt skúlaárið 2008/2009. Talan er um at vera pedagogiskt mennandi hjá næmingunum.

- Einum stuðli til næming í 2. flokki 25 t/viku
- Einum stuðli til næmingar í 3. flokki 20 t/viku
- Einum stuðli til næming í 6. flokki 20 t/viku

**Søkt verður eftir stuðlum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Førleikakrøv:**
Tey, ið verða sett í starv, skulu helst hava námsfrøðiliga útbúgving ella samsvarandi førleika. Fyrimunur er eisini, um umsøkjarar hava royndir at arbeiða við næmingum við serligum tørvi.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúla-stjóranum í hendi í seinasta lagi mikudagin 25. juni kl. 10

Nærri kunning um størvini fáast við at ringja til skúlastjóran ella varaskúlastjóran á tlf. 737761 ella 737762. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo ella til varaskúlastjóran ppm@ffs.fo

## Fuglafjarðar skúli

**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður · Tlf. 737760**

**Fuglafjarðar skúli** fer komandi skúlaár at hava umleið 290 næmingar í 16 flokkum, og her koma at starvast 34 fólk. Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo

## Føroyakvøld 2008
## í Sjónleikarhúsinum

**Framførslur hesar dagar:**

**Dato:**
Týskvøldið 17. juni kl. 20
Týskvøldið 24. juni kl. 20
Týskvøldið 1. juli kl. 20
Týskvøldið 8. juli kl. 20
Týskvøldið 15. juli kl. 20

Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni tlf 302425 og við dyrnar ein tíma undan sýning.

**Havnar Sjónleikarfelag**
Tlf 311132 / 281131
sjonlek@post.olivant.fo
www.hsjonleik.fo

Götu Kommuna

## Pedagogar søkjast til Dagstovnin og Frítíðarskúlan í Gøtu

**Dagstovnurin søkir eftir:**
1 pedagogstarvi á 20 tímar á stovuni »á Rókini« normera til 18 pláss (børn 3 – 7 ár)
1 pedagogstarvi á 30 tímar á stovuni »á Rókini« normera til 18 pláss (børn 3 – 7 ár)
1 pedagogstarvi á 25 tímar á stovuni »í Gjónni« normera til 16 pláss (børn 3 – 7 ár)
1 pedagogstarvi á 20 tímar á stovuni »á Látrinum« normera til 18 pláss (børn 3 – 7 ár)
1 varaleiðarastarv á 35 tímar á stovuni »á Látrinum« og 5 tímar saman við leiðarunum

Dagstovnurin liggur í hugnaligum umhvørvi við Gøtugjógv, nær við skúlan, hagan og gjónna

**Frítíðarskúlin søkir eftir:**
1 pedagog á 20 t. viku, at byrja 15. aug. (arbeiðstíðirnar eru seinnapartin)

Starvið í Frítíðarskúlanum er tíðaravmarkað frá 15. 08. 08 – 30. 06. 09

Frítíðarskúlin liggur í hugnaligum umhvørvi, nær við spæliplass og sandin, í Syðrugøtu.

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m. a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- at virða tað einstaka barnið í bólkinum

**Vit ynskja av tær:**
- at tú er álítandi og hevur góð samstarvsevnir
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerðandisdag
- at tú vilt vera við at mynda og menna tað pedagogiska umhvørvi

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og fylgir lønarstigunum frá 11 – 17.

Nærri upplýsing um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, leiðara á Dagstovninum, fartlf. 771008 ella Hannu E. Olsen, leiðara á frítíðarskúlanum, fartlf. 77 10 09. Skrivlig umsókn, við avritum av prógvum og ummælum, skal sendast okkum í seinasta lagi mikudagin 25. juni kl. 10. 00.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Dagstovnin í Gøtu
Vaktarhúsvegur 1
Postboks 32
FO – 511 Gøtugjógv

Frítíðarskúlan í Gøtu
Fyri oman Brúgv 3
FO – 513 Syðrugøta

Bygdaráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Sosialurin
www.sosialurin.fo